## Martins fer ongan veg

Newcastle flutti fyri góðum mánaða síðan niður í næstbestu ensku fótbóltsdeildina. Obafemi Martins hevur verið ein av stuðulsleikarunum hjá liðnum, og hóast onnur feløg hava sýnt framherjanum áhuga, er lítið sannlíkt, at hann rýmir. Martins hevur fyrr í summar sagt, at hann fegin vil vera verandi og hjálpa felagnum aftur í Premier League. So seint sum fyrrapartin í dag vísti Martins einum tilboði frá Stoke aftur.



## Guardiola vil hava miðvallara

Spanskir miðlar skriva í dag, at Javier Mascherano úr Liverpool er á veg til Barcelona. Miðvallarin hevur staðið sera sterkur í myndini hjá enska felagnum seinastu tvey árini, og Guardiola, venjari hjá Barcelona, vil nú hava Mascherano í sín hóp. Tað er tó lítið sannlíkt, at skiftið verður veruleiki, tí Rafael Benitez ynskir miðvallaran at vera verandi.

# Oyggjaleikir í myndum



Randi Kúrberg gjørdist nummar 5 í sleggjuvarpi. Hon hevði vónað at fingið heiðursmerki, men var hampuliga væl nøgd við longdina á sínum kasti

Mynd: Álvur Haraldsen



Rógvi Højgaard kiksaði fýra av sínum seks køstum við spjótkastinum, og hini bæði køstini høvdu ikki ta longd, sum Rógvi megnar at kasta. Rógvi endaði næstaftastur í kappingini

Mynd: Álvur Haraldsen



Føroysku ítróttarfólkini royna at stuðla hvørjum øðrum, tá stundir eru til tess. Her er partur av badmintonliðnum komin út at hyggja at frælsum ítrótti



Eyðvin Akraberg Hansen gevur fimleikarunum góð ráð. Føroyar vunnu trý bronsumerki í einstaklingakappingini hjá monnum

Mynd: Álvur Haraldsen